

*Tór Verland Johansen syngur og spælir cello í Safir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Safir glitr

# Sirm sirmaði bara

Tór Verland var ikki mettur av tónleiki, tá Safir góvust at spæla. Tí mannaði hann ein bólk, sum hann kallaði Sirm. Bólkurin var fyri tað mesta mannaður við útlendingum, og teir fóru í holt við at gera eina fløgu við tónleiki hjá Tór Verland.

Fløgan varð útgivin í Føroyum í 1999, og bólkurin spældi eina minniliga konsert á jazzfestivalinum í Tórshavn. Serliga var tað tann garrvilli hammondsnillingurin, ið fekk føroyingar at gapa, hann lyfti Hammond Orgli upp í luftina og slepti tí niður aftur við einum braki. Konsertin var garrvill, men somuleiðis tann einasta hjá Sirm.

"Eg hevði brúk fyri at royna at gera tónleik við einum bólki. Tí tað er sera gevandi, um tú megnar at fáa eitt tónlistarligt samstarv í lag við tónleikararnir. Men eftir Sirm fløguna var eg rættiliga sperdur. Eg orkaði stutt sagt ikki at fylgja plátuna upp við konsertum og øðrum, við síðunar av mínum lesnaðin á Århus Universitet.

"Av tí sama haldi eg heldur ikki, at hon gjørdist líka væl dámd sum Safir plátan, men eg eri sjálvsagt glaður fyri, at eg fekk útgivið eina plátu við mínum løgum" sigur Tór Verland.

Millum bólkarnar á risatónleikatiltakinum Asfalt, verður melidiøsa duettin Safir við teimum báðum Janusi Trúgvason og Tór Verlandi Johansen

ASFALT
*Rókur Jákupsson Jakobsen, rokur@sosialurin.fo*
*& Niels Uni Dam, nielsuni@sosialurin.fo*

"Eg brúki høgru hvønn einasta dag – Havi enntá Filmnet, men bara mikudag". Hvør minnist ikki Høgra Jam? Hetta var eitt av teimum heilt stóru hittinum hjá Safir. Løgini hjá Safir vóru sera nógv spæld í útvarpinum síðst í seinastu øld. Tað verður forkunnugt at hoyra teirra væl klingandi sang og spæl aftur á Asfalt.

## Upprunin

Alt byrjaði við, at Janus Trúgvason og Tór Verland Johansen hittust í Café Natúr einaferð í 1995. Janus ætlaði at melda seg til Prix Føroyar og sóknaðist eftir einum at syngja aðrurødd. Teir báðir prátaðu aftur og fram, um hvør mundi verða ein hóskandi loysn, og at enda skeyt Janus upp, at Tór Verland kundi syngja. Tór Verland segði, at hann ikki tímdi bara at syngja aðrurødd, men um hann slapp at taka cello´ina við, so var tað ein heilt onnur søk. Hetta helt Janus verða eitt frálíkt hugskot, og Safir sá dagsins ljós.

## Tilvildarligt navn

Men hví kallaðu teir bólkin Safir? "Tað var mestsum av tilvild", sigur Tór Verland. "Fyriskiparin av Prix Føroyum ringdi til Janus og segði, at bólkurin mátti hava eitt navn, um teir skuldu luttaka. Janus var nývaknaður, og hugdi eftir strúkijarninum hjá mammu síni, á tí stóð Safir. Janus segði so við fyriskiparin, at hann bara kundi skriva Safir á teirra umsókn, og síðani hava teir gingið undir heitinum Safir".

"Eg var ikki serliga glaður fyri hetta navni, men okkurt skuldi barnið eita", sigur Tór Verland. Teir báðir høvdu als ikki ætlanir um at gerast heimskendur í Føroyum, og teir vistu slettis ikki hvat, ið lá fyri framman. "Fyri okkum snúði tað seg bara um at luttaka í Prix Føroyum, og so skuldu vit bara hava tað stuttligt".

## Fyrsta Prix Føroyar upplivingin

Prix Føroyar 1995 var fyrsta árið tiltakið var hildið, og fólk vóru forvitin, tá fyrsta Prix Føroyar undansendingin varð send í SVF. Janus Trúgvason greiðir frá "Vit vóru rættiliga hepnir. Hetta árið valdi SVF at fylgja einum bólki í hvørjum umfari. Í allar fyrsta umfarinum á Tvøroyri, valdu tey okkum. Tí gjørdust hesar sjónvarpsmyndir, fyrsta upplivingin stórur partur av Føroya fólki fekk av Prix Føroyum. Vit gjørdust tí kendur millum mannað beinanvegin". Janus heldur fram: "Sum heild gekk tað rættiliga lætt fyri okkum, tá Útvarpið stutt eftir hetta skuldi brúka livandi tónleik í eini sending, ringdu tey til okkara, ein cello, ein gittari og tvær røddir er ikki so torført at hava við at gera, sum t.d. ein stórur rokkbólkur, og hetta riggaði so mikið væl, at vit tvær ferðir afturat spældu í somu sending."

## Forbiðið ymiskir

Janus og Tór Verland kendust ikki so væl, áðrenn teir funnu saman um tónleikin. Teir sungu saman í onkrum kóri, men annars høvdu teir ikki nógv til felags. "Vit eru so forbiðið ymiskir", greiðir Tór Verland frá. "Tað er so stuttligt. Um eg haldi okkurt, so hevur Janus sum oftast eina aðra uppfatan. Soleiðis er tað allan vegin; eisini tá tað snýr seg um tónleik".

## Myrkt og ljóst

Tónlistarliga riggaði Safir. Tað, at røddirnar vóru so ymiskar, men allíkavæl rigga saman, oman á botninum av gittari og cello, skapti serliga Safir ljóðið. Men einki av hesum var veruliga tilvitað. Tór Verland sigur "Tað

